tjak og meiningar



Nato-støðina. Vónandi hjálpir tað nakað. Nú seinast hava teir bygt út uppi í Mjørkadali, og sett upp antennuskipan við Marinustøðina uttan at okkara fólkavaldu tjóðveldismenn — sum sita í landsstýri — hava orkað at gjørt nakað við tað. Tað verður stuttligt at siggja hvat dómsvaldið fer at gera við hasar «sabotørarnar», sum løgdu á antennuskipanina í fjør heyst uppi við Marinustøðina. Sambært Føroya Løgting skal einki meira útbyggjast á herstøðunum her á landi, men tað fer tó fram uttan at teir kunnu gera nakað við tað. Og hvat skal ein dómari tá døma eftir, tá ið lógsmiðirnir í løgtinginum siga eitt og hervaldið ger nakað annað. Eg tori ikki at hugsa tann tankan at enda, um hvat vit skuldu gjørt, um tað «behagaði» Nato at byggja eina flotastøð inni í Kaldbaksfirði. Løgtingið hevði so einki kunnað gjørt við tað, sigur Bjarki Højgaard.



200 fj. markið største framstigið

Hóast mong bakkøst og vónbrot er tó okkurt hent á sjálvstýrisleið, heldur Bjarki. Tað største framstigið er tá vit fingu okkara 200 fjórðinga fiskimark. Hetta sjómark er sjálvt grundarlagið undir okkara tilveru. Høvdu vit ikki tað, høvdu vit ikki kunnað forhandlað okkum fram til fiskirættindi í øðrum sjógvi, og so var sjálvt lívsgrundarlagið tikið undan okkum á hesum klettum. Og tað er bert ein einasti persónur, sum eigur æruna og heiðurin av hesum, og tað er Erlendur Patursson, sáli, sum bardist at kalla einsamallur fyri hesum máli. So leingi sum vit kunnu lívbjarga okkum sjálvum, so leingi er ein vón fyri, at vit sum fráliður kunnu gerast heilt sjálvbjargnir og rista hetta danska okið av okkum, sigur Bjarki.



— Hvat heldur tú at tjóðveldisfólk fara at siga til tíni úttalilsi her?

— Eg kann svara uppá hetta soleiðis. Undan seinasta løgtingsvali sat m.a. Tjóðveldisflokkurin í andstøðu og hevði allar møguleikar fyri at fáa eitt gott val, aftaná hetta «revisorstýrið», ið næstan megnaði at koyra landið á húsagang. Men hvat hendi? Tjóðveldisflokkurin varð tikin við buksunum niðri um knøini, og fekk eitt fiaskoval. Tað var svárt at vera tjóðveldismaður tann dagin.

— Hvat heldur tú um at taka loysing?

— Eg veri loysingarmaður til min doyggjandi dag, men eg tori ikki at taka loysing við einari slíkari manning sum vit hava. Tað er fyrst og fremst ein persónsspurningur, ið forðar hesum, sigur Bjarki Højgaard.

Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki frá 1. apríl — fyribils í 3 mánaðar.

Drotning Ingridar Meinigehitsbarnagarður
Tlf. 12253

politisk viðmerking

Sambandsuppskot uppá kvamsvís

Eingin sambandsmaður tók undir við Ivan Johannesen um at flyta umsitingina av tyrludeildini vestur í Vágar. Bert tveir sambandsmenn vóru á fundi tá atkvøtt varð, og uppskotið fekk 6 atkvøður, onkur úr andstøðuni og tveir úr samgonguni.

Hetta lýsir best viljan hjá Sambandsflokkinum fyri bygdamenning. Tað er ófatiligt, at maður leggur tílíkt uppskot fram, tá hann ikki frammanundan hevur fingið nakra undirtøku í sínum egna flokki. Annars gjørdu tingmenn vart við, at Ivan Johannesen var formaður í fíggjarnevndini, tá tyrludeildin varð sett á stovn og kundi tá ávirka, at hon bleiv løgd í Vágum.

Endurnýtslupappír til sethúsabjálving

Endurnýtslubólkurin í Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag hevur áhaldandi víst á, at m.a. okkara papp- og pappírsrusk kann brúkast aftur sum ískoyti í nýggjari framleiðslu. Hesum er einki nýtt í. Fleiri endurnýtsluvirki taka í dag ímóti miljónum av tonsum av m.a. gomlum dagbløðum.

Men løgið er, má sigast, at amerikumenn nú í ein heilan mannsaldur hava brúkt gamalt pappír og papp til bjálving innan øll øki. Tí er tað at frøast yvir, at vit nú eisini í Føroyum kunnu fáa fatur á hesi umhvørvisvinarligu bjálving.

Bjálvingartilfarið er gjørt úr tægrum frá viðarmeyki (cellulosa), ið er blandað við mineralskum salti. Urslitið er eitt granulat, ið tolir rot og soppar eins og evni eisini bjálvar avbera væl fyri ljóði.

Í mun til aðra bjálvingarframleiðslu, t.d. glas- og steinull, ið kostar uml. 70 kr. fyri hvønn kubikkmetur í framleiðsluorku, er hetta tilfar, ið nevnist **Isofiber** sera kappingarført — bert 4,20 kr. fyri kubikmeturin í framleiðsluorku. Vit vita hvussu illa dámt tað er at arbeiða við glas- og steinull. **Isofiber** er nú í 4 ár roynt millum handverkarar í Danmark, og eru allir á einum máli um, at tilfarið er uttan nakran sum helst vansa fyri likam og heilsu.

Vit hava her í landinum uml. 8000 tons av pappíri og pappi, ið kann nýtast til framleiðslu av **isofiber** og sum styrkjandi ískoyti í asfalti.

Úr hesum 8000 tonsunum fáast góðar 2,3 milj. fermetrar av bjálving í 100 mm tjúgd. Hetta svarar til eina fullkomna bjálving av 3.800 sethúsum um árið.

Vit hava í Endurnýtslubólkinum gjørt okkum tann ómak, at seta fyrispurning fram hjá framleiðaranum U-Save Insulation LTD í Onglandi, um hvørji tól, ið skulu brúkast til slíka endurnýtsluframleiðslu, hvussu stór høllin skal vera, og hvat tað kostar at seta upp eitt virki, ið kann viðgera góð 8000 tons.

Vit høvdu varhugan av, at framleiðslan var rættiliga einføld, og visti tað seg eisini at passa. Høllin skal t.d. vera uml. 100 fermetrar og framleiðslutólini kosta einar 3,5 milj. krónur í iløgu.

Sostatt kundu vit bygt 3 slík virki fyri tann pening vit í dag brúka til at innflyta glas- og steinull.

Samanumtikið hava vit her eina heilt nágreiniliga ætlan um endurnýtslu av okkara pappírs- og pappruskið. Vit fáa í mun til royk- og aðra dálking, eitt sera umhvørvisvinarligt og væl at merkja bíligt tilfar.

Isofiber kemur um stutta tíð út á føroyska marknaðin sum eitt sera gott boð ímóti vanliga bjálvingartilfarinum.

Í danska blaðnum Politiken frá 15. í hesum er stutt grein um annað áhugavert projekt í samband við endurnýtslu av gomlum dagbløðum. Her er ætlanin at brúka tægrir til at styrkja um flogvøllir og asfalt, ið jú verður brúkt nógv allastaðni.

Her er enn einaferð prógv á borðinum fyri hvussu skilagóð alternativa ruskætlanin er samanborin við ta dýru og vánaligu fyribilsloysn, ið politikarar okkara saman við sínum myndugleikum kroysta niður yvir skattgjaldaran ímóti fólkaviljanum.

Endurnýtslubólkurin í Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag

NYT

VARMEISOLERINGS-KONTROLLEN 625

ISOFIBER

Miljøvenlig loftisolering

ISOLER UDEN RISIKO for råd og svamp. Lad en fagmand gøre det. Selv de mest utilgængelige loftrum og flade tage kan nu isoleres effektivt med ISOFIBER – et løsuldsprodukt.

INGEN GENER FOR HUSEJEREN! Ingen batts og ruller der skal slæbes igennem huset.

ISOFIBER LØSULDSGRANULAT udblæses på loftet gennem en slange, nøjagtig i den tykkelse du ønsker. ISOFIBER trænger ind overalt, tæt omkring spær og tænger, åbne samlinger i gamle mineraluldsmåtter udfyldes. Kort sagt, en bedre og mere effektiv måde at isolere på.

MK-godkendelse fra Boligministeriet.

PRIS-GARANTI.
Absolut billigst på markedet. Det kan ikke engang betale sig for husejeren at købe batts og ruller og selv foretage isoleringen.
Ring og få et tilbud.

Avispapir forstærker flyvepladsens asfalt

Verdenspatent på genbrug af cellulosefibre i Roskilde

TOTAL-ISOLERING
Alle isoleringsopgaver løses med markedets mest miljøvenlige produkter.

EFTERISOLERING 20-30% billigere

Speciale: Vanskeligt tilgængelige steder

Hulmursfyld VARMEISOLERINGS KONTROLLEN 540

ISO fiber VARMEISOLERINGS KONTROLLEN 625

ISODAN

MK-godkendelse fra Boligministeriet.

Aut. forhandler: